# Terry svarar Bellamy aftur

Ein av teimum, sum hevur sagt sína hugsan um gølurnar kring John Terry, er Craig Bellamy, sum um vikuskiftið stóð fyri tveimum av málunum í sigrinum hjá Manchester City móti Chelsea. Og tað vil John Terry ikki hava sitandi á sær. Uttan at fara í smálutir, staðfestir Terry turrisliga, at fólk, sum búgva í glashúsum, ikki skulu kasta við steinum, og sipar hann uttan iva til mongu gølurnar, sum eisini hava verið kring Craig Bellamy, ið aloftast hevur leverað undirhald bæði á og uttanfyri vøllin.



# Bogi og Rói vunnu

Leygardagin var árliga FM kappingin fyri pør í bridge leikt í Bridgehúsinum í Havn. Byrjað varð klokkan 10 um morgunin, og spælt varð líka til kl. 21.30 um kvøldið. Tey 20 pøruni, ið luttóku í finaluni, fingu eina góða, strævna og sera spennandi kapping. Tá ið tvey umfør vóru eftir lógu trý pør nærum jøvn. Tey vóru Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen, Eyðun Antoniussen - Dia Jacobsen og Símin Lassaberg - Árni Dam. Men tá ið avtornaði gjørdust tað teir báðir, Bogi Simonsen og Rói á Rógvu Joensen, ið vunnu kappingina. Símin Lassaberg og Árni Dam gjørdust nummar tvey, meðan Eyðun Antoniussen og Dia Jacobsen, ið annars førdi nærum alla kappingina, gjørdust nummar trý.



Uttan at gera ov nógv burturúr, megnaðu menninir hjá Mjølnir í gjár at vinna á Fleyr

Mynd: Álvur Haraldsen

**Klaksvíkingar reistust aftur eftir taptu steypafinaluna, tá teir í gjár vunnu á Fleyr í Havn, og tí eigur Mjølnir framvegis oddasessin í Eik-liguni hjá monnum. SÍ, sum er hitt liðið í FM-finaluni, spældi ikki, tí dysturin ímóti ÍF varð útsettur**

## Fleyr-Mjølnir 1-3 (18-25, 27-25, 21-25, 21-25):

# Mjølnir hevur munin



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Hvørki Fleyr ella Mjølnir høvdu allar spælararnar til taks, tá liðini møttust í Gundadalshøllini í Havn seinnapartin í gjár. Fleyr mátti vera bæði Høgna Viderø og fyri ein part eisini Sune Juul Pedersen fyriuttan, og hjá Mjølnir vóru hvørki Jón Nielsen ella Jóannes Poulsen við.

Missurin mundi kennast meinari hjá Fleyr, tí Høgni og Sune teljast millum álitini, og tað sást eisini aftur á spælinum, at Mjølnir tóktist minni órógvað enn Fleyr. Kortini megnaði Fleyr at svara aftur í einum av settunum í dystinum, sum nokk á pappírinum sær javnari út, enn hann var á gólvinum.

Onkursvegna tóktist tað, sum Mjølnir ikki legði alla sína orku í dystin, men kortini megnaði at vinna hann, samstundis sum Fleyr hevði ilt við at fáa glið á sítt spæl. Eitt nú vann Fleyr so gott sum einki í sínum egnu servum, meðan teir, sum servaðu hjá Mjølnir, gjarna sluppu at serva nakrar ferðir, áðrenn Fleyr aftur vann bóltin.

Í øðrum setti gjørdist tað tó javnt og spennandi, og tá hevði Fleyr eisini sína bestu løtu og vann. Men hini settini vann Mjølnir rímiliga trygt, og hóast Sune Juul Pedersen, ið nokk var hálvskaddur, kom inn tey bæði síðstu settini, var tað ikki nóg mikið til at flyta úrslitið av dystinum.

Úrslitið merkir, at Mjølnir nú er trý stig framman fyri SÍ, ið tó eigur ein dyst á. Ætlanin var, at SÍ leygardagin skuldi spæla ímóti ÍF, men tann dysturin bleiv útsettur, tí ÍF hevði nógvar spælarar við í FM-kappingini hjá teimum ungu, sum eisini var leygardagin. Ikki er greitt, nær tann dysturin verður spældur.

## ÍF-Fleyr 0-3 (17-25, 23-25, 11-25):

# Fleyr á bronsukós

Fyri ikki so langt síðani sá kappingarárið út til at vera farið fullkomuliga til spillis hjá Fleyr, men nú endaspurturin er í gongd, hava havnarkvinnurnar brádliga møguleika fyri heiðursmerkjum. Gongst alt eftir vild hjá Fleyr, kann tað verða bronsufinalu, tá liðið møtir Mjølnir í seinasta umfarinum.

Í gjár var Fleyr á Kambsdali, har tað eisini gjørdist tann væntaði 3-0 sigurin. Í øðrum setti var tó um reppið, at ÍF fór avstað við øllum, tá Fleyr valdi at royna eina øðrvísi uppstilling, men í triðja setti var aftur eingin ivi og Fleyr vann dystin greitt.

Yvirhøvur hevði Fleyr í dystinum gott uppspæl og fekk lagt trýst á ÍF, sum hinvegin spældi væl í øðrum setti og gjøgnumgangandi tykist spæla alsamt betur. Men Fleyr hevði munin og hevur enn møguleika at taka heiðursmerki, meðan ÍF verður hangandi á næstaftasta plássi.

hil

## Mjølnir-KÍF 3-0 (25-5, 25-17, 25-16):

# Avgreiðsluspurningur

Tað var eingin slingur í valsinum hjá Mjølnir, tá liðið tók ímóti KÍF í Badmintonhøllini í Klaksvík í gjár. Dysturin endaði 3-0, og sostatt eru klaksvíkskvinnur framvegis við í hørðu kappingini í endaspurtinum, har tað ræður um at sleppa fram um TB, skal tað eydnast at koma í FM-finaluna.

Í fyrsta setti ímóti KÍF, tá Mjølnir hevði føstu stammuna inni, var talan um rættiligan avsmurning, tí 20 stig vóru á muni, tá settið var av. Tí var tað kanska ikki so løgið, at Mjølnir hevði hug at eksperimentera eitt sindur í restini av dystinum, umframt at fleiri sluppu at spæla, sum ikki hava verið so nógv inni í vetur.

Til dømis var Mjølnir á odda 21-7 í triðja setti, tá fleiri minni royndir spælarar komu inn, men hóast KÍF vann nógvar bóltar næstu løtuna, áðrenn tær yngru hjá heimaliðnum funnu stevið, var ongantíð nakar ivi um, hvønn veg sigurin fór.

hil